gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Kular Røtur gjørdu vart við seg í Grønlandi



*Jógvan Hansen, Rannvá Lützen, Arnfríð Lützen og Brandur Enni eru sangarar í Kulum Rótum. Tey vóru væl móttikin í Grønlandi, har tey eisini gjørdu onkrar útferðir*

**Ferðin hjá Kulum Rótum til Nuuk eydnaðist betri, enn nakar hevði vónað, og nú ætla Røturnar at halda sambandið við Grønland við líka**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Grønlendsku børnini tóku sera væl ímóti Kulum Rótum, tá føroyski bólkurin hevði konsertir í Nuuk fyrr í mánaðinum.

Ferðin til Grønlands, sum við hvørt verður lagt undir at liggja langt burturi málsliga, geografiskt og mentanarliga, eydnaðist betri, enn nakar hevði vónað.

Høvið var føroyskir mentanardagar í Nuuk, har aðrir føroyingar eisini vóru við. Kular Røtur høvdu tríggjar konsertir í mentanarhúsinum Katuaq í Nuuk, og samanlagt vóru fleiri enn 1200 fólk á hesum konsertum.

Tað vóru fyrst og fremst børn, sum lýddu á, tí tvær konsertir vóru fyri skúlabørnum umframt almenn konsert.

Konsertirnar vóru lívligar, og áskoðararnir livdu rættiliga við í tí, sum fór fram á pallinum.

### Gera meiri við Grønland

Kular Røtur høvdu gjørt seg eitt sindur út til ferðina til Grønlands. Flestu sangirnir vórðu sungnir á føroyskum, men tríggir vóru sungnir á donskum, og niðurlagið í stóra hittinum hjá Kulum Rótum, Hon er omma mín, varð sungið á grønlendskum.

Umframt sjálvan tónleikin var nógv gjørt burtur úr framførsluni á pallinum. Dansarar og trøll undirhildu, og tað riggaði væl saman við tónleikinum.

Nógv varð gjørt burtur úr Kulum Rótum í grønlendska útvarpinum, og Røturnar seldu eisini nógvar fløgur og sjónbond.

Ferðin til Grønlands eydnaðist so væl, at Kular Røtur nú ætla at halda sambandið við Grønlands við líka. Møguliga verður okkurt serligt gjørt til grønlendska marknaðin seinni í ár.

Næsta uppgávan hjá Kulum Rótum verður í heimstaðnum hjá Brandi Enni, Tvøroyri. Leygardagin á jóansøku verður konsert í høllini í Trongisvági kl. 19.00.



*Trølla-omman varð kringsett av grønlendskum børnum eftir konsertirnar í Nuuk*

†

Okkara elskaða kona, mamma, vermamma,
omma og langomma

**VALGERÐ KJÆRBO**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
17. juni 2001 – 72 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr **Betania í Sumba**
hósdagin kl. 13.00.

Familjunnar vegna
**Viggo**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá
kæri faðir, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Janus Poulsen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur og kransar,
tøkk til Jens Vilhelm Danielsen prest
og tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Pleygudeildini.

Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
**Grethard og Jógvan Tummas**

**Tøkk**

Eg takki hjartaliga øllum teimum, sum gleddu meg á 80 ára degi mínum.

**Kærar heilsanir**
**Maria á Lakjuni**



*Sangur hjá Róin Siggertsson er komin í finaluna í stórari danskari tónleikakapping, har møguleikin er at vinna plátusáttmála.*

Mynd: Jonhard Hammer

# Róin kappast um plátusáttmála

**Róin Siggertsson er ein av teimum útvaldu til finaluna í stórari danskari tónleikakapping. Høvuðsvinningurin er ein plátusáttmáli**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyskur tónleikari er komin í finaluni í stóru donsku tónleikakappingini, Hithunters, sum plátufelagið BMG skipar fyri saman við Jubii og Tuborg.

Róin Siggertsson var í síðstu viku kosin at verða ein av 10 finalistum, sum verða við í kappingini um høvuðsvinningin, sum er ein plátusáttmáli.

Hithunters er ein opin kapping, sum fer fram á internetinum. Øll, sum halda seg liggja inni við einum hitti, kunnu senda sítt avrik til kappingina.

Kappingin er skipað á tann hátt, at átta innleiðandi umfør eru. Fyrsta umfarið var fyrst í mai mánaði, og tað seinasta verður fyrst í juli.

### Innleiðandi kappingar

Til hvørja av hesum innleiðandi kappingunum kunnu fólk senda sangir inn. Ein dómsnevnd velir síðani 10 sangir, sum fólk frítt kunnu atkvøða fyri á internetinum. Sangurin, sum fær flestar atkvøður frá internetbrúkarum, kemur í finaluna.

Í síðstu viku var tað sangurin hjá Róin Siggertsson, sum fekk stóra heiðurin at vinna innleiðandi umfar, og tí verður føroyski tón-leikarin við í finaluni, sum verður hildin 30. august.

Umframt teir átta vinnararnar í innleiðandi umførunum, velir dómsnevnd tveir av hinum mongu sangunum, sum eru komnir til kappingina, so at tað samanlagt verða 10 finalistar.

Í dómsnevndini sita umboð fyri Jubii, Tuborg, Roskilde Festivalin, BMG og Danmarks Radio.

### Studio í Herlev

Tað eru stór og vird feløg, sum standa aftanfyri Hithunters, og tí er hetta ein stórur møguleiki hjá tí, sum vinnur kappingina.

Plátufelagið BMG er millum tey størstu í Danmark, og við internetfyritøkuni Jubii og bryggjaríinum Tuborg aftanfyri seg er talan um sterkar fyriskiparar.

Róin Siggertsson býr í løtuni í Danmark, har hann fæst nógv við tónleik. Hann samstarvar nógv við James Olsen og Terja Rasmussen, og teir hava eitt studio í Herlev, har teir framleiða tónleikin hjá sær.

Enn ber til at verða við í Hithunters, tí evstamark til seinastu innleiðandi kappingina er 29. juni, og tað ber til at lesa meiri um kappingina á hithunters.dk.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Vágatunnilin næstan komin hálva leið

**Arbeiðsmenninir hava rent seg í tvær stórar rivur seinastu tíðina, men nú gongur arbeiðið aftur eftir ætlan**

VÁGATUNNILIN
*Stefan í Skorini*

– Fyri tveimum vikum síðani høvdu vit stríð av rivum í fjallinum, men nú eru tær tettar aftur, og arbeiðið gongur sum ætlað, sigur Herman Lindber, verkfrøðingur, ið stendur fyri arbeiðinum at gera undirsjóvartunnil undir Vestmannasund.

Streymoyarmegin hava menn nú borað seg 1450 metrar inn, og í Vágunum eru arbeiðsmenninir nú 650 metrar inni í fjallinum. Tilsamans eru 2100 metrar av tunlinum sprongdir inn.

Hetta er nærum ein helmingur av tí samlaðu longdini av tunlinum.

### Rivurnar kostað dagar

Herman Lindberg sigur, at tær báðar stóru rivurnar hava kostað teimum einar tólv arbeiðsdagar tilsamans. Tá rivur eru í fjallinum skulu tær tettast við betongi, og tað kann onkuntíð taka nakað av tíð. Nógv vatn rann tá í tunnilin, men tað bleiv ikki mált.

Harumframt lá arbeiðið stilt í nakrar vikur, tá verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag leikaði á.

Herman Lindberg kann tó fegnast um, at í Vágunum gongur betur enn væntað. Har hava arbeiðsmenninir ikki rent seg í nakra rivu í fjallinum. Har er púra turt, og tí kann arbeiðið gerast uttan trupulleikar.

Í Vágunum varð fyrsta skotið latið av tann 27. februar í ár, og fyrsta skotið varð latið av Streymoyarmegin tann 28. september í fjør.

*Arbeiðsmenn í Vágatunlinum eru komnir framá tvær stórar rivur seinastu tíðina, men nú gongur arbeiðið aftur sum ætlað*



# Svimjihøllin setir lívbjargara

**Fyri at bøta um trygdina í svimjihøllini hevur mentanarnevndin mælt fíggjarnevndini í Tórshavnar Býráð til at játta pening, so ein lívbjargari altíð kann vera í stólinum í høllini**

SVIMJIHØLLIN
*Stefan í Skorini*

Í fleiri ár hevur svimjihøllin í Havn ongan lívbjargara havt í høllini, meðan skúlar og barnagarðar hava vitjað høllina. Hetta er eftir klokkan 9 á morgni fram til middag, tá høllin annars er stongd fyri almenningin-um.

Svimjihøllin hevði ein lívbjargara í høllini hesa tíðina á degnum fyri nøkrum árum síðani, men vegna sparingar var ikki møguligt at hava fólk í høllini allatíðina.

– Støðan hevur ikki verið nøktandi, sigur Heri á Lava Olsen, stjóri í svimjihøllin í Havn.

Tá tann eini lívbjargarin varð spardur burtur, setti stjórin eina alarmskipan í verk. Skipanin hevur virkað soleiðis, at lívbjargarar hava verið í bygninginum, men teir hava havt aðrar uppgávur aðrastaðni enn í høllini. Um nakað var áfatt í høllini, hava lærarar og pedagogar havt møguleika at trýsta á ein alarmknøtt, sum gevur lívbjargarum boð um at skunda sær inn í høllina.

Tá henda skipanain varð sett ív erk, ringdi Heri á Lava Olsen til allar barnagarðar og boðaði frá, at eingin lívbjargari var í høllini longur. Tí skuldu pedagogarnir hava færri børn við sær í høllina.



*Lívbjargari skal vera í svimjihøllini í Havn allar tíðir á degnum, tá vitjandi eru í hyljunum*

### 120.000 krónur

Stjórin sigur, at hann metti ikki, at tað var neyðugt at steingja svimjihøllina fyri skúlum og barnagørðum, men hann mælti ístaðin til, at barnagarðarnir senda færri børn í svimjihøllina, so lættari er hjá pedagogum at hava eftirlit við børnunum.

Svimjilærarar, sum taka skúlaflokkar í svimjihøllina, hava ábyrgdina av næmingunum og hava útbúgving í fyrstuhjálp.

Heri heldur, at øll, sum koma í svimjihøllina við børnum, skulu hava skeið í fyrstuhjálp og halda henda førleikan viðlíka allatíðina. Hann nevnir í hesum sambandi, at lívbjargararnir í svimjihøllini hava skeið í hjartamassagu einaferð um árið fyri at lívbjargarar altíð eru klárir at veita lívsneyðuga viðgerð, tí tað er tíbetur næstan ongantíð brúk fyri henni.

– Hetta er eitt stórt framstig, sum vit fegnast um, sigur stjórin í svimjihøllini, sum nú hevur lívbjargara at ansa eftir gestunum allatíðina, um fíggjarnevndin játtar peningin.

Talan er um 120.000 krónur, sum mentanarnevndin hevur mælt fíggjarnevndini at játta svimjihøllini. Pengarnir eru oyramerktir til lívbjargara, sum skal sita í høllini, tá barnagarðar og skúlaflokkar vitja høllina. Væntandi fer fíggjarnevndin at játta peningin fyrsta dagin.

At lívbjargari skal vera í høllini allar tíðir á degnum skal forða fyri vanlukkum sum í Sørvági, tá ein seks ára gamal drongur lat lív í svimjihøllini, tá eingin var í høllini.

# Øll fáa nú somu løn

**Føroya Arbeiðsgevarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í , Klaksvík hava nú gjørt ískoytissemju afturat sáttmálanum, sum tey gjørdu fyrst í mei.**

LÍKALØN
*Áki Bertholdsen*

Tá ið verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag var av, endaði tað við, at tey bæði feløgini fingu betri sømdir enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, sum ikki fóru í verkfall, høvdu fingið.

Talan var um, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fingu við í sáttmálan, at tey skulu fáa løn eftir, hvussu leingi tey høvdu arbeitt á sama arbeiðsplássi, Sostatt skuldi ein, ið hevði arbeitt í trý ár á sama arbeiðsplássi, fáa 50 oyru afturat tímalønini frá 1. mei í ár at rokna. Fyrsta mei 2003 hækkar tímalønin hjá teimum 50 oyru afturat, so at samla viðbótin hjá teimum, sum tá hava verið trý ár á sama arbeiðsplási, verður ein króna um tíman afturat vanligu tímalønini.

Tey, sum hava verið fimm ár á sama arbeiðsplássi fáa so eina krónu afturat um tíman, men hetta verður ikki galdandi fyrrenn frá 1. mai í 2005 at rokna.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur alla tíðna gjørt greitt, at tað leggur stóran dent á, at sama løn er galdandi í øllum landinum.

Hesum hevur felagið nú tikið avleiðingarnar av.

Tískil er nú ein ískoytisavtala gjørd ímillum Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag hinumegin um at limirnir í teimum feløgunum, eisini skulu fáa somu aldursviðbøtur, sum limirnir í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava fingið

Sum tað sæst á øðrum greinum í blaðnum, hevur hetta rættiliga loypt øði í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag

# Hava gjørt avtalu um kollfirðingar

FAKFELØG SEMJAST
*Áki Bertholdsen*

Nú er semja gjørd ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag um limirnar í Kollafjarðar arbeiðarafelag

Tað hendi fríggjadagin, tá ið Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag skrivaðu undir eina avtalu um, hvussu farast skal fram ísambandi við limirnar í Kollafjarðar Arbeiðarafelag.

Avtala er gjørd um, at tá ið limur í einum av feløgunum átekur sær arbeiði í økinum hjá hinum feløgunum, skal limurin skifta limaskap so at viðkomandi gerst limur í felagnum á staðnum har hann.

Hesir limir fáa somu limarættindi og hava somu skyldur sum aðrir limir felagsins.

Annars hevur tað verið eitt sindur av ósemju um viðurskiftini hjá kollfirðingum, síðani Kollafjørður kom upp í Tórshavnar Kommunu.

Hetta, tí at Kollafjarðar Arbeiðarafelag er limur í Føroya Arbeiðarafelag, har limirnir í Havn ikki eru.

Ikki minst hevur Havnar Arbeiðsmannafelag gjørt vart við seg um, at felagið ehldur tað vera óheppið, at arbeiðsmenn í somu kommunu eru undir tveimum sáttmálum.

Nú er so ivamálið um arbeiðskvinnurnar í Havn og kollfirðingar loyst í sátt og semju.Hinvegin er onki greitt um nakra semju um menninar.